Stjørnan-Neistin 24-22 (10-11)

Tepur sigur til meistararnar

Føroyameistararnir hvødu stórar trupulleikar av at basa Neistanum, men enn halda tær kósina, hóast hon til tí›ir tykist heldur skinklut

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Ta› var ikki rokna› vi›, at Neistin fór at gera stórvegis skreytir í Klaksvík.

Á stigatalvurni var munurin sera sjónskur undan dystinum, og hóast taan í umvenda dystinum var um ein sera spennandi dyst, so mundu tey flestu rokna vi›, at Stjørnan nú fór at seta alt upp á pláss.

Treiskar havnargentur

Ta› vísti seg tó, at Neistagenturnar vóru nógv treiskari enn so.

Í fyrra hálvleiki gekk leingi javnt á, men mi›skei›is í hesum skrykti Neistin seg brádliga rættiliga leysan av Stjørnuni. Ta› eydna›ist tó meistarali›num at minka somiki› um munin, at hesin var komin ni›ur á eitt mál í ste›ginum.

Í seinna hálvleiki helt javna gongdin áfram, men nú var ta› tó Stjørnan, sum hev›i yvirvág.

Stórur var› munurin tó onganti›, og heilt spennandi gjørdist ta›, at Neistin brádliga aftur leg›i seg framum, tá ta› resta›u 7 minuttir. Seinastu løtuna fekk Stjørnan tó aftur fer› á, solei›is at tær hóast alt fingu fatur á teimum bá›um stigunum, sum spælt var› um.

Ikki nøkur løtt uppgáva

Eftir dystin skiftu vit or› vi› Báru Skaale, sum seinastu tí›ina hevur vunni› sær fastan sess á høgra veingi, nú Adriana Milodanovic er úti vi› ska›a.

Sjálv helt hon, at so leingi tær fáa tvey stig burtur úr dystunum, so eiga tær at vera nøgdar.

– Fólk høvdu kanska rokna› vi›, at ta› fór at gerast ein lættur dystur hjá okkum, men ta› rokna›u vit so avgjørt ikki vi› sjálvar. Dysturin móti Neistanum í Havn var sera torførur, og ta› sama var galdandi hesufer›.

– Tær valdu stóran part av dystinum at mansverja Vesnu Tomajek, og hóast hon kortini megna›i at koma vi› í spæli›, so merkti hetta, at tempskiftini hjá okkum onganti› rigga›u sum tey skuldu.

– Umframt Vesnu, sum spældi ein sera gó›an dyst, so eiga vit eisini at vera fegnar um, at Rannvá stó› somiki› væl í málinum, har hon hev›i fleiri heilt gó›ar bjargingar, tá nógv stó› á.

Um egna leiklut sín, heldur Bára, at hon fyrst og fremst er fegin um, at hon nú tykist at hava sett á plássi› á høgra veingi.

– Sjálvandi er ta› ke›iligt hjá okkum, at Adriana er úti vi› ska›a. Hinvegin hevur hetta givi› mær møguleikan fyri meira spælití›, og so má eg bara royna at liva upp til áliti›.

– Higar til haldi eg, at ta› hevur gingi› óvænta› væl, men sjálvsagt er enn nógv, sum kann betrast. Eg eri ikki von vi› at spæla á hesum plássinum, og so er ta› eisini ein vansi at spæla høgrumegin, tá eg iki eru lám.

Spurd, um ta› er tyngjandi at skula lyfta arvin eftir skjóta jugoslavanum, svarar Bára, at ta› er ta› ikki.

– hugsi eg sum so slettis ikki um. Eg má bara royna at spæla mítt spæl, og so taka tann møguleikin, sum eg havi fingi›, sigur hon at enda.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Stjørnan: Vesna Tomajek 11(6), Bára Skaale 3, Joan M. Joensen 3, Anna K. Samson 3, Una Olsen 2, Vesna Radovic 1, Annika Ljósstein 1
Neistin: Annika Thomsen 8(1), Bjørg Patursson 5, Susan Brockie 4, Mildrid Jacobsen 3, Súna Mørk 1, Birita Wardum 1
Brotskøst: Stjørnan 7, Neistin 2
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

Hóast arvurin eftir Adrianu kann vera tungur, so sigur Bára Skaale seg bert hugsa um at gera sítt besta

Kyndil-VB 21-23 (12-13)

VB reistist í Havn

Efitr stórtapi› í Vestmanna reistist VB aftur sunnudagin, tá tær í einum jøvnum dysti vunnu á Kyndli. Vi› sigrinum slapp VB sær upp á tri›ja plássi› á stigatalvuni

Li›skiparin hjá Kyndli var partvíst nøgd um avriki› sunnudagin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Ta› var umrá›andi hjá VB at vaska ósigurin í Vestmanna av sær, tá tær sunnudagin skuldu royna seg móti Kyndli. Ikki bara sálarliga hev›i hetta t‡dning, men so sanniliga eisini á stigatalvuni, har Kyndil undan dystinum var á odda vi› tveimum stigum.

Stó› nógv á

Ta› eydna›ist eisini VB at toga ein sigur í land, men í løtum stó› nógv á, og ta› var ikki fyrr enn teir 60 minuttirnir vóru lidnir, at sigurin kundi kennast vísur.

VB var tó á odda allan dystin, men stórur var munurin onganti›.

Hvussu stórur sigurin var, mundu tær hjá VB tó ikki leggja í eftir dystin. Tvey stig vóru ta› t‡dningarmesta fyri teirra vi›komandi, og hesum málinum eydna›ist teimum eisini at røkka. Vi› hesum løgdu tær seg í øllum førum fram um í bronsustrí›num, sum longu nú tykist ver›a ein dystur millum Kyndil og VB, me›an VÍF og Stjørnan fara at dystast um, hvar gullmerkini skulu latast.

Ov nógvir feilir

Li›skiparin hjá Kyndli, Jórun Ludvig, helt eftir dystin sunnudagin, at ta› vóru fleiri orsøkir til, at Kyndil mátti lúta fyri VB.

– Eg haldi at vit til tí›ir spældu ein fínan dyst, men vit gera ta› kortini sera torført fyri okkum sjálvar. Bæ›i tí vit gera ov nógvar tekniskar feilir, og eisini tí vit fáa ov nógvar útvísingar.

– Hetta ger, at vit alla tí›ina noy›ast at brúka kreftir fyri at koma aftur í aftur, og tá hetta so onganti› rættiliga eydna›ist, so gjørdist ta› ov tungt hjá okkum.

Har afturat, so stó› Gu›run ein sera gó›an dyst í málinum, og í fleiri førum misn‡ttu vit møguleikar, sum eiga at geva mál, seg›i li›skaparin.

Ikki bara ringt

Hóast hon sostatt kanska i›ra›i seg um tapi›, so dugdi Jórun væl at finna positivar lutir vi› avrikinum hjá Kyndli sunnudagin.

– Vit stríddust sera væl, og eisini í verjupartinum rigga›i ta› væl hjá okkum, tá vit fyrst vóru komnar upp á pláss, so enn er avgjørt ov tí›liga at missa móti upp á hei›ursmerki hetta kappingarári›.

– Stóri trupulleikin hjá okkum er kanska, at hópurin er ov tunnur. Ta› fólk, sum vit hava, er gott, men ta› merkist ov væl, tá onkur leikari av einhvørjari orsøk er burtur frá. Harafturat er venjingarstø›an hjá okukm heldur ikki nóg gó›, tí vit komu ov seint í gongd sammett vi› hini li›ini.

Alt hetta vónar li›skiparin tó fer at batna, og tá Lotte Sørensen eisini ver›ur tøk innan stutta tí›, fer Kyndilsli›i› kanska at ver›a sær sjálvum meira likt komandi vikurnar.

Dysturin í tølum:

Málskjúttar:
Kyndil: Jórun Ludvig 9(2), Signhild Petersen 7(2), Ann Hansen 3(1), Christina Holm 2
VB: Regina Radó 6(1), Guri› Mortensen 5, Sólrun Krossla 4, Rannvá Augustinussen 2, Ey›britt Krosslá 2, Andrea Lütz 2, Mary Krosslá 2
Brotskøst: Kyndil 5, VB 3
Útvísingar: Kyndil 6, VB 5
Diskvalifikatión: Kyndil 1 (3x2 minuttir)
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Kristian Martin Skála

Nú kann ta› bara bera á rætta bor›i›

Herfølge hev›i spæli›, men tapti enn eina fer› á heimavølli og er í stórum trupulleikum

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Ta› stendur einki til hjá Herfølge í løtuni, og sunnudagin máttu teir fyri a›ru fer› í f‡ra dagar lúta fyri FCM

Ta› er sera líti› hugaligt í meistarafelagnum, Herfølge. Jákup Mikkelsen og hansara menn høvdu sunnudagin vitjan av n‡ggja felagnum í superliguni, FC Midtjylland. Gestirnir hava sta›i› seg stak væl, sí›ani teir eftir summarste›gin fyri fyrstu fer› fingu høvi at royna seg í bestu deildini.

Hesa seinastu vikuna hava teir tvær fer›ir spælt ímóti Herfølge, og teir í FCM havva ikki tókst darva›ir av, at teir sum n‡tt li› í bestu deildini hava spælt ímóti meistarali›num.

Mikukvøldi› var Herfølge í Ikast og spældi steypadyst í fimta umfarinum í DONG Cup. Dysturin var útsettur, tá Herfølge fyrr í heyst var upptiki› av Europa Cup fótbólti. FCM vann mikukvøldi› 3–0, og harvi› var luttøkan hjá Herfølge í ársins útgávu av steypakappingini li›ug.

At teir ikki vera vi›, tá fjór›ingsfinalurnar ver›a á skránni hósdagin 19. apríl komandi ár, harmar teir í Herfølge neyvan stórvegis. Teir hava ivaleyst at hugsa um í landskappingini.

Yvirvág

Sunnudagin hev›i Herfølge leikliga yvirvág á heimavølli ímóti FCM. Ta› eynda›ist teimum eisini at spæla seg til onkrar málmøguleikar, men teir fingu einki mál. FCM skora›i tvær fer›ir, og hetta var níggjunda fer›in á ra›, at teir í Herfølge fóru av vøllinum uttan at hava vunni›.

Herfølge er næstni›ast í superliguni, og sunnudagin var ta› sjón fyri søgn, at marginalirnir als ikki eru í parti vi› teimum. Bara 1.321 ásko›arar vóru á Herfølge stadion. Teir kundu sta›festa, at spælararnir á heimali›num høvdu rætta hugbur›in. Teir stríddust um hvønn einasta bólt, teir vunnu flestu nærdystirnar, men oftast var ta› so sum so vi› hugflognum, tá teir skuldu mynda áslopsspæli›.

Fyri heimali›i› var ta› pøs av vatni í andliti›, tá FCM mi›skei›is í 2. hálvleiki kom á odda. Eftir eitt snarálop í høgru var› bólturin frá baklinjuni sendur skrátt út frá til Thomas Thomasberg, sum var leysur, tá hann smekka›i flatt ímillum beinini á einum mótst›umanni. Jákup Mikkelsen tveitti seg, men hann mundi síggja bóltin ov seint, og so var mál.

Lei›slumáli› hjá FCM hev›i vi› sær, at Herfølge tr‡sti uppaftur meiri. FCM hev›i fleiri møguleikar í snarálopum, sum Jákup Mikkelsen vardi fyri. Men í sí›stu løtu var ta› FCM, sum sta›festi sigurin. Ta› gjørdi Christian Lundberg, sum vi› høvdinum snitta›i eitt frísparksinnlegg úr vinstru í máli›.

Komandi vikuskifti er sí›sta umfari› undan vetrarste›ginum á skránni. Herfølge fær tá vitjan av Brøndby. Ta› ver›ur ein uppaftur størri biti, enn ta› var hetta vikuskifti›. Einki er at ivast í, at Jákup Mikkelsen og teir gle›a seg til, at Brøndby vitjanin ver›ur fingin frá hondini, og at teir kunnu sleikja sárini og fyrireika seg til vári›, tá ta› fer at snúgva seg um at strí›ast fyri at sleppa undan ni›urflytingini.

Tjaldur-Sóljan 15-15 (8-6)

Fyrsta stigi› til Runavíkina

Endiliga eydna›ist ta›. Tjaldur fekk javnleik í heimadystinum móti Sóljuni, og vi› hesum komu fyrstu stigini til kvinnuli›i›, sí›ani tær í fjør komu upp í bestu deildina

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Bur›urin var tungur, men sunnudagin bragda›i so fyri fyrstu fer› hjá kvinnunum í Runavíkini

Hóast tær fyrr í vikuni vór›u avsmurdar móti Stjørnuni, so vóru koritni onkrir glottar at hóma í spælinum hjá Tjaldur ta fer›ina. Glottar, sum væl kundu n‡tast til at byggja ví›ari á.

Sunnudagin prógva›u tær, at hesir glottar eisini kundu geva úrslit, tí burtur úr vitjanini av Sóljuni fingu kvinnurnar hjá Tjaldur fyrstu stigini í bestu kvinnudeildini yvirhøvur.

Javn alla tí›ina

Sum sagt, so enda›i dysturin vi› javnleiki, og meginpartin av dystinum var eisini líkt til, at hetta var eitt sannlíkt úrslit.

Munurin áli›unum bá›um var nevnliga onganti› hin heilt stóri. Onkunti› kom hann upp í eini tr‡ mál, meginpartin av tí›ini vóru tvey ella færri mál og muni, og li›ini bæ›i skiftust eisini um at hava lei›sluna.

Í minuttum var ta› Tjaldur, sum hev›i lei›sluna longst, men úrtøkan var kortini um at gleppa teimum av hondum, tá teir seinastu løtuna mistu eina tvey mála lei›slu, solei›is at Sóljan fór framum.

Ta› eydna›ist tó Tjaldrinum at vinna seg upp aftur á javnt, og vi› hesum var› hálva vegna søguliga stigi› fingi› til høldar.

Dysturin í tølum:

Málskjúttar:
Tjaldur: Beinta Joensen 6(3), Milica Ergic 5, Mona Langgaard 3, Oddvá Fossdalsá 1
Sóljan: Simona Dziugyte 10(4), Hertha Simonsen 2, Sólja Nielsen 1, Heidi Haraldsen 1, Heidi M. Akselsen 1
Brotskøst: Tjaldur 6, Sóljan 4
Útvísingar: Tjaldur 4, Sóljan 2
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen

Sóljan-Kyndil 19-23 (9-10)

Kyndil fekk stigini vi› sær

Kyndil vann útidystin móti uppflytarunum úr Sandavági, og vi› stigunum í vi›førniningum heldur havnarli›i› framvegis fast um hei›ursmerkjavónina

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Vi› sigrinum á Sóljuni heldur Kyndil framvegis fast um hei›ursmerkjavónina

Ein dystur var› leiktur í bestu kvinnudeildini fríggjakvøldi›.

Ta› var Kyndil, sum var á vitjan hjá Sóljuni, og heim aftur vi› sær fingu havnargenturnar tvey kærkomin stig, sum merkja, at tær enn fylgja vi› í strí›num um bronsukrónurnar.

Tung byrjan

Ta› gekk tó rúm tíi›, á›renn tær hjá Kyndli kundu kenna seg veruliga vísar í at fáa sigurin heim. Allan fyrra hálvleik fylgdust li›ini sera væl, men tí›liga í seinna hálvleiki eydna›ist Kydnli at skrykkja seg leyst.

Sóljan royndi at vinna seg inn aftur í dystin, men nærri enn tveimum málum komu tær onganti›, á›renn Kyndil aftur gjørdi eitt skarvslop, sum í roynd og veru avgjørdi dystin.

Sóljan royndi enn eina fer› at svara aftur, men nú var ov seint, og hóast tær fingu pynta› eitt sindur um úrsliti›, so slapst ikki undan, at Kyndil fór aftur til Havnar vi› tveimum stigum í vi›førinum.

Dysturin í tølum:

Málskjúttar:
Sóljan: Simona Dziugyte 12(3), Hertha Simonsen 2, Jóhanna í Horni 2, Joan Haraldsen 1, Marjun Jørgensen 1, Sólja Nielsen 1
Kyndil: Ann Hansen 6(1), Jórun Ludvig 4, Signhild Petersen 3(1), Kristbjørg Petersen 3, Christina Holm 3, Anita Kjærbo 2, Jensia Petersen 2
Brotskøst: Sóljan 3, Kyndil 4
Útvísingnar: Sóljan 2, Kyndil 4
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Kristian Martin Skála